# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Abbe Pierre var eitt stórt menniskja; hann var samvitskan, og hann var ímyndin av tí góða*

*Jacques Chirac, forseti*

# Skip við 2200 bingjum kann brotna

**Meiri enn 200 bingjur eru longu farnar í havið, og bretska sjóverjan stúrir fyri, at skipið kann brotna ella holvast**



*MSC Napoli. Í morgun lá skipið umleið 30 stig á bakborð.*

MSC Napoli kom í havsneyð í illveðri í síðstu viku. Tað eydnaðist at bjarga manningini, og bretsku myndugleikarnir gjørdu av at seta skipið á land heldur enn at lata tað reka fyri víg og vind.

Nú er vandi fyri, at MSC Napoli kann brotna. Skipið hevði ikki færri enn 2.394 bingjur umborð, tá tað kom í havsneyð, men síðani eru meiri enn 200 bingjur farnar í havið, og fleiri teirra eru síðani riknar inn á strondina nærhendis Sidmouth í útsynningspartinum av Onglandi.

Myndugleikarnir har siga, at lastin hjá skipinum vigar góð 41.000 tons, og at av tí eru umleið 1.700 tons av ymsum vandamiklum evnum. Harafturat eru umleið 3.000 tons av olju í tangunum, og higartil eru umleið 200 tons runnin út í havið.

MCS Napoli er 16 ára gamalt og bleiv seinast góðkent til altjóða farmasigling fyri tveimum árum síðani. Tað vóru bretsku sjóferðslumyndugleikarnir, sum kannaðu og góðkendu skipið tá.

# Saman kunnu tey vinna

**So hevur Hillary Clinton kunngjørt, at hon ætlar sær at stilla upp til forsetavalið næsta ár, men tað er ikki vist, at hon kann vinna**



*Hillary Clinton og Barrack Obama. Saman kunnu tey vinna amerikanska forsetavalið næsta ár*

Sum fyrrverandi forsetafrúa og sum væl lýddur senatorur er Hillary Rodham Clinton eitt væl kent andlit í USA. Hon hevur fingið nógv rós fyri sítt arbeiði í Senatinum, men tey nógvu árini á politiska pallinum hava eisini útvegað henni mótstøðumenn. Eitt nú hava mong ilt við at gloyma, at hon atkvøddi fyri innrásini í Irak, og so hava fólk heldur ikki gloymt tann serliga leiklut, sum hon fekk sum forsetafrúa.

Millum teir demokratisku veljararnar er kortini eingin ivi um, at Hillary er tað besta forsetavalevnið hjá flokkinum. Í einari meiningakanning hjá Washington Post siga 41 prosent av demokratunum, at tey styðja Hillary. 17 prosent siga eg styðja Barrack Obama.

Men í somu kanning siga 44 prosent av teimum spurdu, at tey eru ikki heilt nøgd við Hillary Clinton, og tað er eitt stórt tal, siga politiskir eygleiðarar. Eitt nú halda fleiri demokratiskir veljarar, at hon er ov frælslynt, og tað kann geva henni trupulleikar í summum statum. Tí fer hon ætlandi at brúka tað næsta árið til at sissa tey misnøgdu.

Tann stóri spurningurin er, um USA er búgvið til at fáa eina kvinnu í forsetaembætið, og um tað er rætt at velja eina kvinnu til forseta, meðan landið er í kríggi. Meiningakanningar vísa, at amerikanararnir hava álit á einari kvinnu sum forseta, og at tær flestu kvinnurnar eru sinnaðar at velja eina kvinnu í Hvítu húsini.

Í løtuni sær tað út til, at Barrack Obama er tann einasti, sum fer at geva Hillary Clinton mótstøðu, tá demokratarnir skulu velja forsetavalevnið. Hann er svartur, og tí skal flokkurin selja ímillum at fáa eina kvinnu ella ein svartan mann í forsetaembætið, og hvørki er roynt fyrr.

Politiskir eygleiðarar siga, at velja tey at stilla upp saman, annað sum forsetaevni og hin sum varaforsetaevni, kann tað gerast trupult hjá øðrum at basa teimum.

## STUTT SAGT

### Stríðsmaður deyður

Franski presturin Abbe Pierre doyði í nátt 94 ára gamal. Tann rómverskkatólski presturin var víða kendur fyri sítt áhaldandi stríð til frama fyri tey fátæku og heimleysu í Fraklandi og aðrastaðni. Tað var Jacques Chirac, forseti, sum kunnaði franska fólkið um, at presturin var deyður. Í fráboðanini segði forsetin, at Abbe Pierre var ein stórur maður og ímyndin av tí góða. Abbe Pierre doyði á einum hernaðarsjúkrahúsi í París.

### Endiliga sleiti í

Fyri fyrstu ferð í næstan tríggjar mánaðir kundu fólk í Bergen í gjár fegnast um, at tað regnaði ikki. Tað er einki at siga til, at fólk vóru fegin í gjár, tí tá hevði tað regnað hvønn einasta dag síðani 29. oktober ella í samfullar 84 dagar. Annars hevur tað kavað nógvastaðni í Noregi teir seinastu dagarnar, men ikki í Bergen. Veðurmenninir siga, at tað skuldi kava eitt sindur í dag, men at tað væntandi fer aftur at regna mitt í vikuni.

### Sovnaði og rendi á

Seinasta sumnmar rendi ein danskur trolari á ein oljupall í Norðsjónum, og nú hevur sjóferðslustýrið staðfest, at skipið rendi á, tí at tann 24 ára gamli stýrimaðurin var sovnaður á brúnni. Stýrið sigur, at stýrimaðurin, sum er niðurlendingur, var troyttur eftir at hava verið á vakt leingi. Hann hevði verið niðri á dekkinum og fór aftur á brúnna, har hann var einsamallur. Men stut eftir sovnaði hann, og hóast tólini á brúnni ávaraðu um samanstoyt, vaknaði hann ikki, fyrr enn skipið rendi á oljupallin. Hvørki pallurin ella skipið fingu stórvegis akaða.